# Lønarflytingar á Lønarportalinum

1) Far inn á heimasíðu okkara [www.bankin.fo](http://www.bankin.fo)
2) Vel «Rita inn» ovast til høgru
3) Trýst á «Lønarportalurin» í teiginum til høgru og síðani «Rita inn á Lønarportalin her»




4) Trýst á "Rita inn við Samleikanum"



# Lønarflytingar á Lønarportalinum

5) Rita inn við Samleikanum og Góðkenn við Samleikanum




6) Fyrstu ferð tú ritar inn, verður tú biðin um at skráseta títt fartelefonnummar.
7) Skriva títt fartelefonnummar og trýst síðani á "Broyt"
8) Trýst á "Heinta SMS-kotu". Tú fært nú eina kotu sendandi, og síðani skalt tú tøppa kotuna inn og trýsta á "OK".



# Lønarflytingar á Lønarportalinum

## Lønmóttakarar

Soleiðis skrásetur tú upplýsingar um lønmóttakarar:

- Trýst á ”Lønmóttakarar”.
- Skriva P-tal, navn og kontunummar.
- Legg til merkis, at frítíðarkontunummar er 6460 2998000
- Trýst á ”OK”




Um tú skalt skráseta fleiri lønmóttakarar, endurtekur tú gerðina.

# Lønarflytingar á Lønarportalinum

## Lønarflyting

1) Skriva Arbg.nr. (v-tal) og vel "Kontonr.", og trýst síðani á "Stovna"




2) Vel móttakara. Navn, P-tal og kontunummar koma sjálvvirkandi fram



# Lønarflytingar á Lønarportalinum

3. Skriva A-inntøku og forvunna upphædd (kr.)
4. Skriva eftirlønarupphædd. Eftirlønin fyri 2026 er í minsta lagi 12% av A-inntøkuni og frítíðarlønini tilsamans. Tað er lógarkrav, at allir lønmóttakarar, sum eru undir eftirlønaraldri, fáa eftirløn.
5. Skriva frítíðarløn (kr.)
6. Trýst “OK”

Tú hevur nú stovnað eina lønarflyting. Um tú skalt flyta løn til fleiri lønmóttakarar, trýstir tú aftur á ”Stovna” og tøppar viðkomandi upplýsingar inn. Soleiðis heldur tú fram, inntil tú hevur skrásett allar lønmóttakararnar.




7. Tá ið tú hevur skrásett allar lønmóttakarar, trýstir tú á ”Send”.




8. Tú fært boð um lønarflytingarnar og um upphæddina. Trýst á ”Heinta OTP-kotu”.
9. Tú fært nú eina kotu sendandi til fartelefonnummarið, sum er skrásett. Tøppa kotuna inn fyri at vátta lønarflytingina.

# Lønarflytingar á Lønarportalinum

## Innsendir lønarlistar

Við at trýsta á ”Innsendir lønarlistar” finnur tú allar lønarflytingar, sum eru sendar inn fyri felagið (v-talið). Tú sært eisini støðuna á innsendu lønarlistunum.

Tú kanst leita í eitt ávíst tíðarskeið við at velja dagfesting í kalendaranum og síðani trýsta á ”Dagfør”.

Um tú vilt senda ein lønarlista umaftur, sum áður er sendur, kanst tú lata listan upp, broyta dagfestingina og síðan trýsta á ”Send”.

